# Summar Festivalurin klárur við jólagávuni

**Mánadagin verða fyrstu atgongumerkini til Summar Festivalin sett til sølu. Festivalurin næsta ár verður enn størri og betri enn undanfarin ár, siga fyrireikararnir**

SUMMAR FESTIVALUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*The Rasmus var eitt av stóru nøvnunum á Summar Festivalinum í ár. Næsta summar fara onnur stór nøvn at spæla í Klaksvík, og higartil hava heimshittini trivist væl á Vágsbøi*

*Mynd: Gvøðny Gunnarsson*

Mánadagin verða fyrstu atgongumerkini til Summar Festivalin 2007 sett til sølu, men festivalurin kunnger ikki nakran bólk áðrenn jól.

- Vit hava nógv spennandi á veg, og fólk vita jú, at vit klára at skapa ein góðan festival við nógvum góðum tónleiki og góðum umstøðum annars. Vit kunngera tó ikki nakran bólk nú, tí tað hevði næstan verið synd at latið eitt stórt festivalnavn drukna í jólameldrinum, sigur Steintór Rasmussen, ein av fyrireikarunum.

Uttanlands er tað eisini vanligt, at festivalarnir seta fyrstu atgongumerkini til sølu uttan at nakar bólkur er komin á plakatina – tað gera danski Roskilde festialurin og aðrir festivalar í ár.

### Útbyggingar og betringar

Summar Festivalurin bjóðar frá mánadegnum og fram til seinasta dagin í hesum árinum fólki at keypa vikuskiftispass fyri 595 krónur. Frá 1. januar 2007 hækkar prísurin.

- Hetta er eitt serligt tilboð til okkara trúfastu gestir, sum vit tíbetur hava nógvar av. Tey, sum longu hava gjørt av, at tey fara á Summar Festivalin næsta summar, kunnu keypa sær atgongumerki fyri hendan serliga prís, sigur Steintór Rasmussen.

Summar Festivalurin setir 1000 atgongumerki til sølu fyri lægsta prísin, og atgongumerkini verða seld á Shell-støðunum kring landið.

- Tað gongur væl við fyrireikingnunum til festivalin næsta ár. Vit eru komnir longri, enn vit plaga at verða hesa ársins tíð. Hóast vit ikki avdúka nakran bólk nú, so kunnu vit vissa fólk um, at tað verður ein rimmar festivalur í 2007. Vit fara at gera tøkniligar útbyggingar av palli, ljóði og ljósi, og vit fara eisini at betra um festivalin á annan hátt, sigur Steintór Rasmussen.

Summar Festivalurin hevur verið fyri støðugum vøkstri seinastu trý árini, og fyrireikararnir siga, at teir ætla at liva upp til undanfarnu festivalar.


FØROYINGASØGA Á FRUMMÁLINUM!




FÆREYINGA SAGA
FØROYINGASØGA

*Ólafur Halldórsson gav út.*

**Føroyingasøga** er søga um gøtuskeggjar, føroyska høvdingaætt, ið heiti bar eftir Gøtu í Eysturoy. Høvuðsevnið í søguni er stríð millum tveir ólíkar partar; øðrumegin er Tróndur í Gøtu og frændur hansara og hinumegin Sigmundur Brestisson og eftirkomarar hansara. Tróndur er heiðin og gandakallur snildur í brøgdum, ið einki firnast at vinna sær ríkidømi og vald í stríði sínum við noregshøvdingar. Aftur ímóti er Sigmundur vammaleys hetja og vápnafimur sum fáur. Hann gerst maður Ólavs kongs Trygvasonar, tekur við skírn, fær Føroyar í len av honum og boðar kristni í landinum.

Ivaleyst munnu mangir føroyingar hava hug at lesa hesa merkisverdu fornu søgu á hennara íslendska frummáli, sum stendur føroyskum nútíðarmáli rættiliga nær.

Søluumboð í Føroyum: Bókamiðsølan, á Hjalla 7B, 100 Tórshavn.

HIÐ ÍSLENZKA FORNRITAFÉLAG

Skeifunni 3b • Sími 588 9060 • Netfang: hib@islandia.is • Heimasíða: www.hib.is


# Nýggjur muSICur á alnetinum



Føroya harðasti og tyngsti tung málms bólkur SIC hevur fyri stuttum útsett útgávuna av fyrstu fløguni hjá bólkinum, men nú ber til at fáa eina smakksroynd.

Á myspacesíðuni hjá bólkinum er villi, harði og ógvusligi sangurin Keep It To Yourself lagdur út. Lagið er nakað av tí harðarsta og skitnasta, ið er komið út í Føroyum. Larmandi deyðsmálmur, við frumskriggjum frá Mikkjal Gaard Hansen, manninum, ið Karl Anton Klein sáli, kallaði ta feitastu rokkrávøruna, ið vit eiga.

Vitjað SIC á myspace.com/sicsix6

**nud**